gult cyan magenta svart



# Frá matvørum til teldur

*Fríggjadagin vóru liðin 50 ár síðani fyritøkan Farodane varð stovnað*

EIRIKUR LINDENSKOV

Tað var í 1949, at Carl Herup Olsen saman við Poul Als Jensen og Børge Husted-Andersen fóru undir eitt kommissionervirki í Keypmannahavn, við tí endamáli at selja alskyns vørur til handlar og virki í Føroyum. Felagið fekk heitið A/S Farodane.

Men tað var skjótt, at teir komu eftir, at tað ikki var nóg mikið at sita í Keypmannahavn og keypa inn og selja til føroyingar í Føroyum. Skuldi nóg væl fáast burturúr, var neyðugt eisini at hava sæti í Føroyum, og tí varð gjørt av, at Carl Herup Olsen, sum var fluttur til Danmarkar við familjuni, skuldi fara heimaftur.

Soleiðis varð dóttirfelagið P/F Farodane, sum fór til verka 1. september 1950 stovnað. Tá varð hildið til í kjallaranum hjá Emil Juul Thomsen í Bókbindaragøtu. Farodane var tá ein vanlig heilsøla, sum fyrst og fremst beyð handlum kring landið matvørur og aðrar dagligvørur, men fekst eisini við útflutning av fiskavørum og øðrum.

Í 1954 flutti felagið í egin høli við Tinghúsvegin í Havn, har Landsverkfrøðingurin í dag hevur høvuðsskrivstovu sína.

Men síðani Farodane seldi matvørur er mangt broytt. Í 1976 yvirtóku feðgarnir Carl og Ólavur Herup Olsen allan partapeningin í felagnum.

Fyritøkan hevði tá í fleiri ár selt roknimaskinur og skrivimaskinur og legði seg seint í sjeytiárunum eftir at selja skrivstovuútgerð og skrivstovuinnbúgv. Hetta gjørdist størri og størri partur av virkseminum hjá felagnum, men tó vóru matvørurnar framvegis 60 prosent av umsetninginum - langt upp í áttatiárini.

Í 1980 flutti Farodane av Tinghúsvegnum í nýggj stásilig hús í Hoyvík. Sølan vaks við ferð á øllum økjum, ikki minst innan skrivstovuútgerð, og felagið kom til eitt vegamát. Hóast sølan av matvørum var stór, hildu teir seg síggja skriftina á vegginum. Teir stóru handlarnir løgdu seg meira eftir at innflyta sjálvir, meðan samhandilin við heilsølurnar kom í aðru røð.

Í 1987 slepti Farodane matvørunum og øðrum sum hekk uppí. Dentur varð nú lagdur á at gera Farodane til eina tænastufyritøku fyri skrivstovuútbúnað og skrivstovuinnbúgv.

Tíðliga í nítiárunum fór Farodane undir at selja edv-útgerð. Í fyrsta umfari var talan um teldur frá Toshiba, prentarar og neyðugt tilhoyr. Í 1993 tók felagið yvir T-Mac í Havn, sum seldi Canon kopimaskinur og Macintosh teldurnar frá Apple.

Seinnu árini hevur felagið eisini lagt seg eftir at selja viðskiftafólki KT tænastu.



*Trý ættarlið á Farodane: Rolf Herup Olsen, pápi hansara Ólavur Herup Olsen og pápi hansara Carl Herup Olsen*
**Mynd: Jonhard Hammer**

Meir enn helvtin av edvfólkunum arbeiðir í dag við menning og netumsiting. Farodane hevur eisini keypt seg inn í føroyska felagið VisionSoftware, sum selur og mennir fíggjarstýringarskipanina Navision, eins og felagið hevur sett á stovn skeiðstovuna Kvasir.

Carl Herup Olsen legði fyri nøkrum árum síðani frá sær sum stjóri fyri aldur, men hann er framvegis nevndarformaður og er inni á gólvinum hvønn dag.

# Veðrið



**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av vestri, um kvøldið lækkar hann niður í sunnan. Sólglottar, men kanska okkurt ælið og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn. Um kvøldið minni vindur av ymsum ættum. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind ella skrið av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, seinni landnyrðing. Ælaveður og hitin millum 7 og 11 stig.




Eitt djúpt lágtrýst vestanfyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani fer um Føroyar mikudagin.




Eitt lágtrýst eystanfyri New Foundland kemur móti Føroyum og dýpist nógv.




**Hitalagið mált frá 03./09. kl 06⁰⁰–04./09. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,1°C**
Minsti hiti máldur í september: **÷0,5°** Mesti hiti máldur í september: **19,5°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 03./09. kl 6⁰⁰–04./09. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í september: 0,0 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 16 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannahavn | 16 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

## Vestfalskyrrindi

5. sept.: Fyrra kvarter
8. sept.: Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. sept. | 11.54 | – | 10.54 | 23.21 | 11.09 | 23.36 | 01.29 | 13.54 | 02.29 | 14.54 | 10.09 | 22.36 | 09.09 | 21.36 | – | 12.09 | 00.44 | 13.09 | 11.39 | – | 00.29 | 12.54 |
| 6. sept. | 00.21 | 12.53 | 11.53 | – | – | 12.08 | 02.21 | 14.53 | 03.21 | 15.53 | 11.08 | 23.41 | 10.08 | 22.41 | 00.36 | 13.08 | 01.36 | 14.08 | 00.06 | 12.38 | 01.21 | 13.53 |
| 7. sept. | 01.26 | 14.04 | 00.26 | 13.04 | 00.41 | 13.19 | 03.26 | 16.04 | 04.26 | 17.04 | – | 12.19 | 11.19 | 23.56 | 01.41 | 14.19 | 02.41 | 15.19 | 01.11 | 13.49 | 02.26 | 15.04 |
| 8. sept. | 02.41 | 15.19 | 01.41 | 14.19 | 01.56 | 14.34 | 04.41 | 17.19 | 05.41 | 18.19 | 00.56 | 13.34 | – | 12.34 | 02.56 | 15.34 | 03.56 | 16.34 | 02.26 | 15.04 | 03.41 | 16.19 |

Kelda: Skipalistin 2000

variant
Galvaniseraðir viðfestisvognar



Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

BILLUTIR



ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Sig tað uttan rokning



pætur & pætur • 320870

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð.

*Kom inn í eina av Telebúðunum og hoyr meira um, hvussu tú sleppur undan telefonrokningunum...*

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo